## Tórshavn á Norðurbryggjuni

Leygardagin 23. februar letur ein framsýning um menningina í Tórshavn upp á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, fer at seta framsýningina, sum er opin til 18. mai. Ferniseringin verður á Norðurbryggjuni leygardagin 23. februar frá klokkan 14 til 16. Almenna heitið á framsýningini er »Tórshavn - identitet og arkitektur«. Sýningin er sett upp í samstarvi millum Norðurbryggjuna og Tórshavnar kommunu.



## Eysturbúgvin inn at landa

**Sandur:** Tíðliga í morgun kom trolarin Eysturbúgvin á Sand, har hann leggur veiðuna upp til P/F Sandoy Seafood. Eysturbúgvin samtrolar við Vesturbúgvan, og var veiðan henda túrin um 370.000 pund tilsamans, skrivar heimasíðan bkv.fo. Skipari hendan túrin var Jóhan Petur í Soylu

# Umhugsa at hækka prísin

**Hóast metavlop boðar stjórin í Atlantic Airways frá, at felagið umhugsar at seta prísin á ferðakostnaðinum upp; tað váttar Magni Arge fyri Rás2**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað ljóðar eitt sindur paradoskalt, at eitt felag við metavlopi kortini umhugsar at seta prísin á sínum vørum upp. Men tað ger Atlantic Airways.

– Úrslitið hjá okkum sigur jú frá gongdini í árinum, sum fór, og tá eg vísi á, at tað verður neyðugt at hyggja eftir, hvussu inntøkur og útreiðslur skulu hanga saman í inniverandi ári, so er talan um ein heilt annan rakstur, sigur Magni Arge við Rás2.

Hann vísir á, at tað eru ávísar inntøkur, sum felagið hevði í fjør, sum teir ikki vænta at fáa í ár. Her hugsar hann serliga um inntøkur, teir høvdu av íløgum í onnur feløg, kanska serliga Atlantic Petroleum.

– Haraftrat standa vit framman fyri støðugt hækkandi útreiðslum. Síggi, at oljan er farin upp um hundrað dollarar fyri tunnuna, og lønarútreiðslurnar eru støðugt hækkandi, sigur Magni Arge.

Stjórin í Atlantic Airways er ikki samdur í páhaldinum um, at flogferðaseðlaprísirnir kring allan heim verða dumpaðir, og harvið verður bíligari hjá fólki at flúgva, meðan føroyska flogfelagið umhugsar príshækkan.

– Eg eri ikki samdur í hesum. Tað seinasta, sum hendur í londunum uttan um okkum, er, at Coast Air í Noregi er farið á heysin, og tað sama er hent fyri City Star Airlines í Aberdeen. Ryan Air hevur boðað frá, at teirra avlop fer at falla við 30-40%. Stirling hevur hækkað sínar prísir, so tað er ógvuliga ymiskt, hvussu ymsu feløgini takla støðuna. Tað, sum er umráðandi hjá okkum er, at vit hava ein sunnan rakstur, við einum hampiligum avlopi, tí tað er størsta trygdin fyri, at Føroyar kunnu hava ein góðan veitara á flogvinnuøkinum, sigur Magni Arge.

### Smájusteringar

Men stjórin í Atlantic Airways vil ikki siga her og nú, at talan veruliga verður um eina príshækkan í árinum.

– Tað verður neyðugt at seta nøkur tiltøk í verk, og spurningurin er so, um vit kunnu lækka kostnaðin á summum økjum, og í øðrum førum hækka nøkur gjøld, sigur Magni Arge.

Hann vísir á, at tað serliga er á ávísum útreiðslupostum, at økingin hevur verið óvanliga stór.

– Útreiðslurnar í sambandi við ólag á ferðsluni vegna veður, hevur kostað okkum fjúrtan milliónir krónur í fjør, móti tíggju milliónum í 2006 og sjey í 2005. Sjálvandi hevði verið best, um veðrið batnaði, men tað verður neyðugt at útbyggja flogvøllin í Vágum, og flogvallarviðurskiftini sum heild, sigur Magni Arge.

Ein annar møguleiki er, sambært stjóranum á Atlantic Airways, at minka um Súluskipanina, og harvið sleppa undan prísvøkstri. Undir øllum umstøðum verður ikki talan um ta stóru strukturbroytingina í príspolitikkinum, men einans talan um smájusteringar, sum verða greiðar um ein mánað ella so.

Spurdur um kursvirðið á felagnum, sum er níggju prosent lægri enn innara virði á felagnum, er nøktandi, sigur Magni Arge, at tað til eina og hvørja tíð er ein meting hjá tí, sum er villigur at keypa og selja partabrøv í felagnum.

- Orsøkin til kursfallið er eitt sindur ring at fáa eyga á, um tú hyggur at raksturin hjá felagnum, og teimum avtalum, sum vit hava gjørt í seinastuni, staðfestir Magni Arge.

Um sín egna vinning í felagnum – og tann veruleika, at hann í ársroknskapinum stendur at hava fingið 434.000 krónur í bonus – sigur stjórin í Atlantic Airways, at hetta helst stavar frá góðum úrsliti og stórum innsatsi.

- Men hatta mást tú spyrja nevndarformannin um. Eg havi gjørt eina avtalu við mín arbeiðsgevara, og hana standi eg við. Eg havi fingið hasa lønina, og eg eri ikki flovur av henni, segði Magni Arge, stjóri á Atlantic Airways við Rás2.



*Magni Arge er ikki flovur av lønini, hann fær, eiheldur bonus'inum*




Íløguráðgeving - royn Skjern Bank



Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

Skjern Bank bjóðar íløgumøguleikar, ið hóska júst til tín tørv.

Fá eitt prát við Gunnar Streymoy og hoyr nærri um tínar møguleikar.

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK

ReadSpeaker

Upplestur

Upplestur á heimasíðum

Alt fleiri heimasíður hava nú fingið teldutalu, so vitjandi við lesitrupulleikum av einum hvørjum slag eisini fáa fulla kunning á sama støði sum onnur -

Rættilig "Public Service" fyri øll!

Stovnar, fyritøkur og privat við heimasíðum kunnu útvega sær hesa tænastu frá
HH-Support – tlf. 515091 – fax 315091
info@hh-support.com - www.hh-support.com

HH-Support

Ringið um fleiri upplýsingar ella biðið um vitjan av ráðgeva